# Sjónvarpið hevur nógv á skránni í vetur

**Sjónvarp Føroya er nú farið undir vetrarskrá sína, og nógvar forkunnugar føroyskar sendingar koma á skermin næstu mánaðirnar.**

## Leygarkvøld

Leygarkvøldini eru lættari samrøðusendingar og undirhaldssendingar á skránni. Vetrarskráin leggur fyri við 4 sendingum undir heitinum Spælivinir, har Edvard Nyholm Debes hevur virknar tónleikarar í sjónvarpsstovuni (tvær sendingar við Ólavi Hátún og Sámali Ravnsfjall eru sendar). Restina av heystinum verður undirhaldssendingin Rangt og Rætt á skránni hvørt leygarkvøld.

Komandi leygarkvøld er Malan Thomsen gestur hjá Edvardi. Tosa vit um føroyskan poppsang, so koma vit ikki uttanum Maluna Thomsen. Við síni vøkru rødd hevur hon sungið nógvar av okkara kendastu sangum, eins og hon hevur givið fløgu út saman við manninum, Finni Hansen. Finnur er eisini við í sendingini Spælivinir leygarkvøldið. Malan byrjaði longu sum heilt ung at syngja alment, og vit skulu í sendingini hoyra og síggja meira um hennara tónleikaralív, bæði fyrr og nú.

Í húsorkestrinum eru Rógvi á Rógvu, Herluf Lutzen, Edvard Nyholm Debess og Finnur Hansen. Seinasta sendingin av Spælivinum verður tann 13. oktober, og gesturin tá er Marner Lisberg.

Miðskeiðis í oktober verður so Rangt og Rætt á skránni. Tá kemur fyrsta sending av átta. Høvuðstættirnir í sendingini eru orðagátur og tónleikagátur. Sendingin er skipað við tveimum liðum, sum hvør hevur sín liðskipara. Liðskiparar í hesum átta sendingunum eru Jógvan Ósá og Kári Mouritsen. Hinir luttakararnir, sum eru kendir og minni kendir føroyingar av báðum kynum, verða skiftir út í hvørjari sending.

*Rangt og Rætt verður sent fyrstu ferð leygarkvøldið 20. oktober*

## Sunnudagssendingar

Andaligar sendingar úr Danmark.

Manning úr SvF hevur í heyst verið í Danmark og vitjað samkomur og kirkjur, har føroyingar koma saman. Og haðani hava vit tvey evangelisk møti og eina gudstænastu.

Tær komandi sendingarnar eru hesar:

- Møti í Eliaskirkjuni í á Vesterbro Torgi í Keypmannahavn tann 14. oktober 2001
- Gudstænasta í Samuelskirkjuni á Nørrebrúgv tann 4. november 2001 - Bergur Jacobsen, prestur prædikar
- Møti í Malta - salinum hjá brøðrasamkomuni - í Hirtshals tann 25. november 2001.

## Mentanarsendingar

Hvørt sunnukvøld er ein føroysk mentanarsending á skránni. Annan hvønn sunnudag senda vit røðir og annan hvønn sunnudag stakar sendingar.

Fyrsta sendirøðin í heyst er í trimum pørtum og lýsir ævisøgu Hans Andriasar Djurhuus. Lítli maður fra Fjallafonn er heitið á røðini, og tað er Hanus Kamban, sum hevur skrivað og lagt til rættis. Fyrsti partur varð sendur sunnudagin 30. september og verður endursendur hósdagin 4. oktober. 2. og 3. partur verða sendir 14. og 28. oktober.



Malan Thomsen er gesturin í 3. sending av Spælivinum, ið víst verður leygarkvøldið 6. oktober

Føroysk myndlist eitur ein sendirøð í níggju pørtum, sum viðger føroyska list frá upphavi til dagin í dag. Tað er Bárður Jákupsson, sum í síni tíð gav út bókina Føroysk Myndlist, sum hevur skrivað og lagt sendingarnar til rættis.

Fyrsta sending kemur sunnukvøldið 11. november.

Komandi sunnukvøld 7. oktober eitur mentanarsendingin ”Lundin fer á flog og kranin dryppar”. Í einum húsum mitt í Havn ganga nøkur fólk og skera og skava, snara og pressa, smyrja og turka — nei, hetta eru ikki bilsmiðir, hóast handverkið minnir ikki sørt um bilsmíð. Talan er um fýra listafólk og tey gera grafiskar myndir. Malan Johannesen vitjar Astri, Ogga, Aase og Jónu. Prátað verður um grafisku listina og um handverkið, og vit fáa eitt innlit í hvussu eitt listaverk verður skapað.

Lagt til rættis: Malan Johannesen. Fotografur: Bjarni Rubeksen. Klipt: Ragnar A. Jacobsen

Lundin fer á flog sunnukvøldið 7. oktober, kl. 20.00

## Mánakvøld

Dagur og vika mánakvøld.

Nýggj sjónvarpsstova verður innrættað til Dag og viku-sendingarnar í heyst, og tá hon er liðug verður farið undir at senda fýra tíðindasendingar um vikuna. Fjórða tíðindasendingin fer at liggja mánakvøld. Dagur og viku-sendingarnar fara at umfata tíðindi, umframt útdýpandi ískoyti við kjaki, mentan og uttanlandstilfari. Í sambandi við at Dagur og Vika verður umløgd verða Grannar Okkara aftur gjørd til eina sjálvtøðuga sending, og fer hon at liggja mikukvøld.

Í sambandi við tíðindasendingarnar fer sjónvarpið eisini í heyst at taka uppaftur táttin við kjaksendingum.

Fyrsta mánadagssending við Degi og viku verður væntandi um miðjan november.



Nýggj sending við heitinum “Lundin fer á flog og kranin dryppar” byrjar nú sunnukvøldið 7. oktober

## Gesturin

Hvørt mánakvøld er ein gestur í sjónvarpsstovuni, sum á onkran hátt hevur gjørt vart við seg hesa seinastu tíðina. Gesturin nú mánakvøldið 8. oktober er John Eli Olsen. Tær flestu føroysku fyritøkurnar, ið bjóða seg fram í oljuvinnuni, hava als ongar altjóða royndir. Hetta er tó ikki galdandi fyri P/F El-Service á Skála, sum í fleiri ár miðvíst hevur fyrireikað seg til at fara upp í oljuvinnuna, og sum næsta ár fer at gera álvara av ætlanini. Tað ber ikki til longur at sita og bíða eftir hvat fer at henda innan oljuvinnuna. Fyritøkurnar mugu broyta hugburð og sjálvar royna at gera seg galdandi, heldur John Eli Olsen. Hann rósar landsstýris-manninum í oljumálum og umsiting hansara fyri arbeiði teirra higartil. Hinvegin lastar hann landsstýrismenninar í fíggjar- og vinnumálum og stýrum teirra fyri ikki at hava gjørt sítt arbeiði nóg væl.

Lagt til rættis: Leivur Hansen. Fotografur: Jógvan Páll Johannesen. Klipt: Ragnar A. Jacobsen. Ljóð: Alexander G. Joensen. Ljós: Hans Petur Hansen. Pallsnið: Regin D. Patursson. Intro: Thomas Jensen. Smyrsl: Maiken Poulsen.

Gesturin hvørt mánakvøld kl. 20.25

Okkara matstovur eitur ein nýggj kokkasending

Mánakvøldið 15. oktober fer fyrsta matsendingin av bakkastokki. Tá fara vit at vitja Hotel Norð á Viðareiði, har Gudmund Gudmundsson fer at gera tríggjar rættir saman við kokkinum har norðuri. Sjónvarpið hevur í summar verið og vitja fleiri matstovur kring landið, og fingið tey at gjørt mat fyri okkum. Vitjað verður m.a. á Shanghai í Klaksvík, á Hotel Eiði, á Muntra í Fuglafirði og so matstovurnar í Havn, Nantong, Rio Bravo, Hotel Føroyar og Hotel Hafina.

Seinni í heyst er so ætlanin at fara í sjónvarpsstovuna og gera nakrar matsendingar, sum verða sendar eftir nýggjár.

Okkara matstovur verður send fyrstu ferð mánakvøldið 15. oktober



“Gesturin” mánakvøldið 8. oktober er John Eli Olsen

## Mikukvøld

Grannar okkara.

Tá Dagur og Vika um miðjan november fer at verða send fýra ferðir um vikuna, verða Grannar Okkara aftur ein sjálvstøðug sending, sum fer at liggja mikukvøld kl. 20.00.

## Eingin desembermánaði uttan Barnajól

Í ár er tað Vár B. Jacobsen, ið fer at leggja jólasendingarnar til rættis. Tær verða 12 í tali, umframt eina størri jólaaftanssending. Fastir tættir í jólasendingunum í ár verða m.a., at vitjað verður á musikkskúlunum úti um landið, sum fara at framføra hvør sítt jólalag, ymiskir kendir og minni kendir føroyingar fara at siga frá mest ógloymandi jólum sínum, og sum ein gjøgnumgangandi og samanbindandi liður í sendingunum fara vit at hitta jólavætturin Glóða, ið fer at leiða børnini ígjøgnum jólamánaðin í sjónvarpinum.

Barnajól verða send fyrstu ferð 1. desember.

# hygg & hoyr



Frá fríggjadegi 5. oktober til hósdagin 11. oktober

## Spælivinir




*Malan Thomsen. Vit tosa um føroyskan poppsang, so koma vit ikki uttan um Maluna Thomsen. Við sínu vøkru rødd hevur hon sungið nógvar av okkara kendastu sangum, eins og hon hevur givið fløgu út saman við manninum Finni Hansen. Finnur er eisini við í sendingini Spælivinir leygarkvøldið. Malan byrjaði longu sum heilt ung at syngja alment, og vit skulu í sendingini hoyra og síggja meira um hennara tónleikalív, bæði fyrr og nú. Í húsorkestrinum eru Rógvi á Rógvu, Herluf Lutzen, Edvard Nyholm Debess og Finnur Hansen.*

*Vertur er Edvard Nyholm Debess.*

## Harem 2001 (1)

*- Reality-sending*

Sá byrjar leitanin eftir tí einasta eina í nýggju sendingini hjá TV3, Harem. Hetta verður fyrsta høvið hjá hyggjarunum at hitta luttakararnar – 4 vakrar kvinnur og 18 menn. Øll hava tey sama dreymin um flyta frá tilverðuni sum stakur og vilja leiðast í freistingina, paralag. Tær vøkru moyggjarnar eru: Mette Helm-Petersen fra Århus, 27 ár, Channie Jensen(CJ), 22 ár, frá Køge, Birgitte Hall, 35, frá Hørsholm og Susanne Sarchar, 23 ár, frá Greve, men býr í Keypmannahavn.

I HAREM eru kvinnurnar í undirtali, men tað eru tær, sum hava magt og fyrimunir – tær verða fylgdar tætt av framleiðsluliðnum og Camillu Miehe-Renard, sum leiðir hyggjarnar gjøgnum tær 10 sendingarnar. Tær fýra verða innkvarteraðar í luksus umstøðum á Maldivisku oyggjunum. Menninir verða noyddir at taka til takkar við heldur meira sparsom forhold sama stað. Hvønn dag eru kvinnuligu høvuðspersónarnir á spennandi stevnumøtum, og menninir mugu bíða í spenningi, um teir nú verða valdir at fara út við gentunum.

Hvørja viku verður fylgt við, hvussu kvinnurnar velja út teir hepnu menninar, sum skulu undirhalda teimum á stevnumøtum og øðrum tiltøkum. Og hyggjararnir fáa eisini møguleikan at fylgja við, tá kvinnurnar aftaná døma innsatsið hjá monnunum á øllum økjum. Vit hyggja sjálvandi eisini eftir, tá menninir ikki eru saman við kvinnunum, og vit hyggja eisini eftir, hvussu tað gongur á teimum ymisku stevnumøtunum.

Stevnumøtini fyriganga bæði ein og ein og í bólkum og eru heilt ymisk. Tað kann vera ein vanligt stevnimøti við ljósum á borðinum ella kann tað vera okkurt meira eksotiskt sum at kava ella ein túr í jungluna. Tað snýr seg um hjá monnunum at vera kreativir felagar, um mann vil gera seg galdandi hjá øllum fýra kvinnunum – ella bert tí eini. Teir




mannligu luttakararnir kunnu ongantíð kenna seg heilt tryggar í HAREM. Annan hvønn dag verður í minsta lagi ein av monnunum stemmaður út. Til síðst eru tað einans fýra menn eftir, sum koma í tað stóru finaluna saman við kvinnunum.

Finalan verður eitt stórt show, har allir luttakararnir eru aftur í Danmark. Tá skulu m.a. hyggjararnir velja, hvat par, teir vilja skal vinna. Vinnararnir vinna eina ferð fyri tvey.

## Mamman fyllir 100 ár




## Lundin fer á flog og kranin dryppar




## Pretty woman




## Gesturin 4

